FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-89_2
dags. 23-04-2010

Innlendismálaráðið
Att: Kristvør Poulsen

imr imr.fo

Viðv.: Tygara 1601-018/06-47, uppskot til kunngerð um bunkring og flutning av oljulast.
Felagið hevur 26. mars móttikið uppskot til kunngerð um bunkring og flutning av oljulast til hoyringar. Hoyringsfreistin er ásett til 23. apríl.

Málið var viðgjørt á stýrisfundi 13. apríl og hevur felagið hesar viðmerkingar.

Alment
Uppskot til kunngerð um bunkring er sent til hoyringar áður. Hettar var í 2004 og í 2007.

Nú uppskotið er sent til hoyringar aftur fegnast felagið um, at vit fáa eina kunngerð, ið ásetur reglur fyri framferðarháttinum, tá bunkrað verður, og sum byggir á meginregluna, at dálkarin betalir fyri átøkum, at basa møguligari oljudálking.

Kommunan í staðin fyri kommunustýrið og havnameistaran,
Í samband við fleiri ásetingar í uppskotinum, í § 9, § 16 og § 17, eru "kommunustýrið og/ella havnameistarin" nevnd í samband við eftirlitsuppgávuna hjá kommununi.

Her metir felagið, at eftirlitsmyndugleikin greitt eigur at nevnast "kommunan".

Tilbúgvingarætlan umborð
Í § 16 stk. 5 verður álagt kommununi eftirlitsuppgávu í samband við, at móttakarar og veitarar skulu hava eina tilbúgvingarætlan. Hendan ætlan skal lýsa útgerð og mannagongdir, um olja t.d. rennur yvir.

Felagið metir tað vera ógreitt, hvat hendan tilbúgvingarætlanin er. Skal hon t.d. vera niðurskrivað ella er nokk, at kommunan fær eina munnliga frágreiðing um hettar frá móttaka og veitara.

Lagt verður tí upp til, at t.d. Skipaeftirlitið ger ein tilbúgvingarleist fyri bunkring á minni skipum. Skiparin hevur síðan ábyrgd av, at manningin er kunnað um ætlanina.

Møguliga kundi verið kunnað um tilbúgvingarleistin í Álmanakkanum.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo

Oljufeløgini eiga, saman ella hvør sær, at hava niðurskrivaðar tilbúgvingarætlanir fyri bunkringsuppgávur. Umhvørvisstovan kundi t.d. havt eftirlit við, at oljufeløgini høvdu slíkar.

Revsing og sektaruppskot
Felagið metir, at ábyrgdin fyri at áseta sektaruppskot eigur at liggja hjá Umhvørvisstovuni. Kommunan kann, í samstarv við Umhvørvisstovuna, savna prógv í málum um oljudálking í samband við bunkring.

fyri felagið

Ásbjørn Djurhuus, formaður

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo